# Posta Stamps

Føroyar

Nr. 37

September 2018



- Astrid Andreasen 70 ár
- Jól 2018
- Postgjaldsmerki Macao 2018

Posta FAROE ISLANDS



# Astrid Andreasen 70 ár

Astrid Andreasen, listakvinna, fylti 70 ár 31. juli 2018.

Í hesum sambandi var stór heiðursframsýning í Müllers Pakkhúsi frá 4. august – 19. august 2018.

Astrid er føroysk listakvinna, ið er fødd og uppvaksin í Vestmanna. Hon hevur arbeitt og arbeiðir við list í breiðum týdningi. Hon hevur gjørt eina røð av listaverkum og hennara list prýðir nógvar stovnar og fyritøkur í Føroyum. Eisini hevur hon gjørt nógv frímerki og nógvar tekningar av livandi verum, sum finnast í Føroyum, fuglar, fiskar, tara osfr.

Astrid arbeiðir við ymiskum tilfari sum t. d. tekstil - herundir áseyming, binding, hekling, baldýring og veving. Vatnlitum/ akryl, blýantstekningum - m.a.: vísindaligum illustratiónum umframt metal, klipp og steinprent.

Henda sera virkna listakvinna okkara hevur teknað allar fuglarnar í Føroyum, allar fiskarnar og allar blómurnar - og taran!

Eisini hevur hon gjørt framúr vøkru altartalvuna í Vestmanna kirkju. Um hon so einki annað hevði havt avrikað, hevði hon uppiborið virðisløn fyri hana. Hendan altartalvan kom út sum frímerki 16. september 2009.




*Altartalvan í Vestmanna kirkju*



*Eitt úrval av blómutekningunum hjá Astrid Andreasen*

Á myndunum síggjast nøkur dømi um sera fjølbroyttu listina hjá hesi vestmannagentuni, handarbeiðslæraranum, listarhandverkaranum og listakvinnuni, sum nú er vorðin sjeyti. Tekningarnar av taranum og blómunum eru so neyvar, reinar og fínligar, at tað tykist sum vóru tær órørdar av mannahond. Nakað fullkomið er yvir teimum.

Av nýggjastu frímerkjunum, sum Astrid Andreasen hevur teknað fyri Posta er t.d. smáarkið við flugunum (FO 872-875), frímerkið við makrelinum (FO 883), og frímerkið við ikoninum (FO 886).

Astrid er gift við Bjørka Geyti. Tey hava tvey børn og 5 ommu- og abbabørn.



*Hendan ikonin varð givin út sum frímerki 24. september 2018*




Royndarprent

Gevið gætur! Teir savnarar, sum hava postgjaldsmerki í haldinum, fáa Macao-merkini sendandi saman við útgávuni í november 2018! Haldarar fáa óstemplað sett (4 x 10 kr).

# Postgjaldsmerki: Macao 2018

Á framsýningini, ið var í Macao 21. - 24. september 2018 vórðu hesi serligu postgjaldsmerkini givin út. Listamenninir, Martin Mörck og Anker Eli Petersen hava í felag sniðgivið útgávuna. Evnið er hundar. Hundarnir á postgjaldsmerkjunum eru ein mops, ein husky og tveir føroyskir seyðahundar (border collie)

Savnarar kunnu eisini ogna sær hesi serstøku Macao postgjaldsmerki og eru hesi settini til keyps:

**1 x Innanoyggja:** (local strip)
4 x 10 kr = 40 kr

**1 x savnarasett :** (collectors strip)
1 x 10 kr + 12 kr + 18 kr + 20 kr = 60 kr.

**4 x savnarasett (fýra av hvørjum virði):**
(collectors strip of four)
4 x 10 kr + 12 kr + 18 kr + 20 kr = 240,- kr.
(16 merki í alt)



*Martin Mörck*



*Amerikanskur kirkjugarður frá fyrra heimsbardaga tætt við Verdun í Fraklandi*

# Fyrri heimsbardagi: smáørk

Anker Eli Petersen hevur sniðgivið hesi bæði smáørkini, sum hava fyrra heimsbardaga sum evni.

Fyrra smáarkið lýsir fyrsta partin av krígnum og tær avleiðingar tað hevði fyri føroyingar. Seinna arkið vísir endan av stóra krígnum, sum kravdi so mong mannalív.

*„Ræðuliga kríggið var av. Teir, ið komu frá tí við lívinum kundu fara heim – mangir við herviligum løsti og fleiri við kvølfullum minnum um eina ta størstu vanlukkuna, mannaættin hevur drigið inn yvir seg sjálva. Men teir vóru hóast alt á lívi.*

*Aðrir vóru ikki líka hepnir. Teir vórðu jarðaðir í ta fremmandu jørð, teir høvdu stríðst so hart fyri. Allan vegin framvið gamla hermótinum í Belgiu og Fraklandi, liggja risastórir hernaðarkirkjugarðar, har gravsteinarnir standa í snórabeinum røðum. Tigandi varðar yvir ungar menn, ið ikki sluppu at liva tað lív, teir høvdu uppiborið.“* A.E. Petersen




**Útgávudagur: 24.09.2014**




**Útgávudagur: 24.09.2018**

## Jólamerkini




30 DKK

## Jólakort:
## Trý ymisk jólakort við bjálva




25 DKK

# Jólini 2018

### Jólamerkini 2018

Miriam Hinz hevur teknað ársins jólamerki, sum í ár hava kavamenn í ymiskum sniðum og støddum sum myndevni. Fimtan jólamerki eru í arkinum.

Avlopið av søluni fer til Jólamerkjagrunnin, ið hevur til endamáls at stuðla tiltøkum fyri børn og ung í Føroyum.

Jólamerkjagrunnurin játtaði í desember í 2017 KRIS 200.000 kr. til arbeiði við týðing av upplýsandi tilfari til m.a. barnagarðar og skúla.

**Jólamerkjaarkið kostar 30,00 kr.**

### Jólakort

Trý dupult jólakort við myndevnum úr jólamerkjaarkinum fáast eisini til keyps. Jólakortini verða seld sum sett við trimum kortum í hvørjum setti.

**Jólakortini kosta v/ bj. 25,00 kr. settið.**




*Joel undir Leitinum, stjóri, handar her umboðum fyri KRIS stuðulin frá Jólamerkjagrunninum*



## Ársmappa 2018




424 DKK

## Árbók 2018




475 DKK

### Ársmappa

Kundi tú hugsað tær at keypt øll ársins frímerki skjótt og ómakaleyst? So er hetta loysnin. Í ársmappuni eru øll frímerki og smáørk, ið eru givin út í ár. Mappan verður seld fyri áljóðandi virði.

**Ársmappan kostar 424,00 kr.**




*Svartprent: Fuglafleyg*

### Árbók

Árbókin savnar allar ársins frímerkjaútgávur og saman við frímerkjunum fært tú áhugaverdu søguna aftanfyri hvørja útgávu lýsta við greinum og vøkrum myndum.

Av útgávunum í 2018 kunnu nevnast flugur, brýr, ikonur, fleiri 100-ára hald og vakrar náttúrumyndir. Tekstirnir í hesi snøggu bók eru á donskum, týskum og enskum og hóskar bókin seg tí sera væl sum gáva til vinir og kenningar uttanlands. Frímerki og smáørk eru sett í lummar í árbókini.

**Árbókin kostar 475,00 kr.**

### Svartprent!

**Eitt svartprent av "Fuglafleyg" er við í árbókini 2018 - púra ókeypis!**
**Í leysasølu kostar svartprentið 150,00 kr.**



# Jólaútgávur - 5. november 2018




Nýggj útgáva: **Jólamerkini 2018**
Útgávudagur: 05.11.2018
Prísur: 30,00 kr.
Listafólk: Miriam Hinz
Prentsmiðja: Cartor Security Printing, Frakland




Nýggj útgáva: **Árbók 2018**
Útgávudagur: 05.11.2018
Prísur: 475,00 kr.
Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark




Nýggj útgáva: **Ársmappa 2018**
Útgávudagur: 05.11.2018
Prísur: 424,00 kr.
Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

# Postgjaldsmerki: Macao




Nýggj útgáva: **Postgjaldsmerki Macao**
Útgávudagur: 21.09.2018
Stødd: 56 x 25 mm
Virði: 4 x 10 kr.
Listafólk: Martin Mörck og A.E. Petersen
Prentháttur: Flexoprent
Prentsmiðja: Cartor Security Printing, Frakland

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Vitin á Velbastað. Myndatøka: Ingi Sørensen. Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark.

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

ISSN 1603-0036

/faroestamps